




# Góð fólkapensjón – ein hornasteinur í vælferðarsamfelagnum



INGRID S. HENRIKSEN
Javnaðarflokkurin

Hóast útgjaldið frá samhaldsfasta er hækkað rættiliga fitt skjótt farna valskeiðið, hava fólka-pensjónistar í Føroyum enn ikki fingið nøktandi fíggjarlig livikor – teir hava ikki fingið eins góð livikor sum fólkapensjónistar hava í Danmark.

Flest allir fólkapensjónistar í Føroyum, ið bert hava fólkapensjónina og samhaldsfasta at dúva á, mugu framvegis venda hvørjari krónu fyri at fáa pensjónina at røkka til. Hetta serstakliga tí at teir mugu gjalda fleiri sosial gjøld v.m. sjálvir burturav pensjónini, t.d. sjúkrakassa og viðgerð hjá fysio-ella ergoterapeuti sum danskir fólkapensjónistar sleppa frá at gjalda sjálvir. Harumframt gjalda danskir fólkapensjónistar, ið bert hava lága inntøku afturat pensjónini, bert ½ útvarps- og sjónvarpsgjald. Eisini eru gerandisvørur dýrari í Føroyum enn í Danmark og oljunýtsla til upphiting av egnum bústaði er hægri í Føroyum enn í Danmark. Tískil mugu fleiri ábøtur gerast á fólka-pensjónsøkinum, ið kunnu tryggja, at allir fólkapensjónistar í Føroyum – serstakliga tey mongu, ið nærum bert hava fólkapensjónina og samhaldsfasta at dúva á - kunnu fáa sømulig og nøktandi fíggjarlig livikor.

**Grundarupphæddin ikki regulerað í 9 ár**

Føroyska fólkapensjónsgrundarupphæddin er hvørki prís- ella lønarregulerað seinastu 9 árini og eigur tí at verða regulerað við afturvirkandi kraft samstundis sum syrgt verður fyri, at grundarupphæddin verður prís- og lønarregulerað á hvørjum ári í framtíðini. At bøta um fíggjarligu støðuna hjá støkum fólkapensjónistum er harumframt neyðugt, at viðbótin verður hækkað.

At tryggja føroyskum fólkapensjónistum eina góða og rímuliga fólkapensjón eigur grundarupphæddin at verða regulerað upp til danskt støði (danska grundarupphæddin verður 5.096 kr. um mánaðin í 2008 til ávikavist giftar og stakar pensjónistar) – t.v.s at giftir og stakir fólkapensjónistar í Føroyum eiga at fáa 5.096 kr. í grundarupphædd um mánaðin í 2008, og ikki sum nú, har gift bert fáa 3.313 kr., meðan støk bert fáa 4.169 kr. í grundarupphædd um mánaðin.

**Gift verða diskriminerað í fólkapensjónshøpi**

Sum er verða gift fólk diskriminerað í fólkapensjónshøpi. Hetta er óskiljandi og órímuligt, tí serstakliga í føroyska samfelagnum verður hildið, at hjúnabandið er góð institutión og samfelagsskipan, sum ikki eigur at vera ein vansi – heldur ikki í pensjónshøpi. Fólkapensjónin til gift og støk má javnstillast, og mugu gift og støk fáa somu grundarupphædd – júst sum gjørt verður í Danmark. Neyðugt er somuleiðis at broyta pensjónsreglurnar, soleiðis at einans verður tikið atlit til inntøkuna hjá pensjónistinum sjálvum og ikki sum nú, har inntøkurnar hjá báðum hjúnafeløgunum verða lagdar saman, áðrenn fólkapensjónin verður ásett.

# Sjálvandi vil Javnaðarflokkurin byggja nýggjan studentaskúla í Havn - ongantíð ov skjótt



HELENA DAM Á NEYSTABØ
Javnaðarflokkurin

Um so er at tað er satt – og tað fái eg meg illa til at trúgva – at Javnaðarflokkurin er forðingin fyri at vit fáa bygt ein nýggjan studentaskúlan í Havn, so "má vend koma í".

Javnaðarflokkurin hevur ikki umsitið skúla- og mentamál í farna valskeiði, og kann tí ikki standa til svars fyri, at eingin loysn er funnin. Tað skal politiskt hegni til at fáa semjur í lag um stór mál, og tað fara vit at prógva í næsta valskeiði.

Tá SKAL ein nýggjur studentaskúli byggjast í Havn.Tað er eitt av teimum heilt ítøkiligu vallyftum, sum bæði eg og Javnaðarflokkurin geva.Tað stendur rimmarfast – og hesum fari eg at berjast fyri, fái eg nakra politiska ávirkan eftir valið.

Alt bendir á, at tann skilabesta avgerðin er at byggja ein nýggjan skúla, og at tað er ómøguligt, at byggja ein nýggjan skúla í Hoydølum, samstundis sum útbúgvingin skal halda fram í somu hølum.

Eg haldi, at tað er eitt óneyðugt misálit á egnan politiskan mátt, at halda, at ein nýggjur studentaskúli, t.d. í Marknagili, er tað sama sum at oyðileggja verandi studentaskúlaskipan.

Tað er upp til politisku skipanina og til leiðslu skúlans, at tryggja, at tann góða útbúgvingarmentanin, sum røður kring studentaskúlaútbúgvingina, verður varðveitt og ment í nýggjum hølum – hvar tey so enn verða. Sjálvandi megna vit tað.

Ein nýggjur studentaskúli skal borga fyri betri dygd, størri fjølbroytni og trivnaði í allari útbúgvingarskipanini. Sjálv haldi eg, at tað bert kann vera ein fyrimunur, at byggja upp eitt sterkt og fjølbroytt útbúgvingarumhvørvi, har smærri og kreativar lærugreinir eins og lærugreinir á høgum fakligum stigi kunnu trívast og mennast.

# Nøkur av mínum hjartamálum:

## Heilsuverkið - Útbúgving - Umhvørvið



SÆUNN ÓLAVSDÓTTIR HANSEN
Valevni fyri Sambandsflokkin

**Heilsuverkið**

Sjúkrahúsverk Føroya, tvs. Nærverkið, Røktarheimini og sjúkrahúsini skulu hava neyðugu játtanina til dagliga raksturin.

Virksemið innan alt Sjúkrahúsverk Føroya er økt munandi seinastu 10 árini.

Starvsfólkatalið eru ikki økt í sama mun og hetta viðførir, at arbeiðsbyrðan nú er ov tung fyri tey starvsfólk, sum virka innan Sjúkrahúsverk Føroya. Alt fleiri og fleiri verða langtíðarsjúkrameldað.

Tí er alneyðugt, at vit miðvíst virka fyri rekruttering av starvsfólkum til Heilsuverkið.

Samstundis er neyðugt at góðskumenna og góðskutryggja tænasturnar.

Heilsuverkið er fyri sjúklingin og tí er neyðugt at fjálgað verður um starvsfólkini soleiðis, at sjúklingurin fær so góða viðgerð, røkt og eftirviðgerð sum yvirhøvur gjørligt.

Samstundis má arbeiðast fyri, at sosiala løggáva okkara verður soleiðis skipað, at tey sjúku, fólk við serligum tørvi og tey eldru fáa viðgerð og stuðul á sama støði sum í grannalondum okkara.

**Útbúgving**

Útbúgvingarskipan okkara skal altíð verða á hædd við tey krøv, sum eitt framkomið samfelag setur.

Útbúgvingarskipanin eigur at verða løgd soleiðis til rættis, at øllum føroyingum stendur í boði at fáa best møguliga útbúgving á so mongum økjum sum til ber og at vinnulív okkara eisini á hendan hátt fær best møguligar umstøður at arbeiða undir.

Útbúgvingarnar skulu altíð verða soleiðis, at tær kunnu verða góðkendar á altjóða stigi.

Tey lesandi eiga at fáa útbúgvingarstuðul, sum tryggjar øllum fíggjarligar møguleikar at fáa ta útbúgving, sum tey sjálvi ynskja.

Allir lærarar og útbúgvingarleiðarar skulu hava møguleika fyri regluligari førleikamenning.

Tað skal verða møguligt at taka fleiri hægri útbúgvingar á Fróðskaparsetrinum, t.d. løgfrøði.

**Umhvørvið**

Eg vil virka fyri einum tilvitaðum og miðvísum umhvørvispolitikki og harvið verða við til at varðveita fríu og vøkru náttúru okkara til komandi ættarlið.

Somuleiðis virka fyri alternativum orkumøguleikum.

**Fíggjarpolitikkur**

Ein treyt fyri omanfyrinevndu tænastum er ein skynsamur fíggjarpolitikkur. Tí er neyðugt við einum sterkum og fjølbroyttum vinnulívi, sum gevur bestu møguleikar fyri tryggum fíggjarviðurskiftum og trygg fíggjarviðurskifti eru fyritreytin fyri vælferðini hjá tí einstaka føroyinginum.

**Les meira á: *saunn.com***

# Mítt hjartamál: Eingin skattur av yvirtíð



SÁMAL PETUR Í GRUND
valevni sjálvstýrisfloksins

**Skattur**

Tað er gott samfelagssinni at gjalda skatt við gleði, men ein neilig skattaskipan er tyngjandi fyri borgaran í einum landi.

Verandi skattaskipan fremur ikki á nakran hátt virkisfýsni borgarans.

Tí mangla vit arbeiðsmegi í landinum.

**Samfelagsskylda**

At rinda skatt er ein samfelagsskylda, men hvussu langt strekkir henda skyldan?

Tá vit hava goldið skatt av 8 tímars arbeiðsdegi, hava vit so ikki gjørt skyldu okkara?

Tá ein borgari av eini ella aðrari grund velur at arbeiða útyvir 8 tímar dagliga, eigur samfelagið tá at krevja hann eftir hægri skatti, av hesi mangan súrt tjentu upphædd?

**Arbeiðsmegi**

Um vit høvdu eina skattaskipan sum innibar, at vit rindaðu skatt av 8 tímars arbeiðsdegi og at alt arbeiði útyvir tað kom arbeiðaranum sjálvum tilgóðar, so manglaðu ikki virkisfýsnar hendur í landinum!

**Vinnuframi**

Ein tílík skattaskipan kann vera ein munagóð vinnuframaskipan, við tað at so nýtast virkini ikki at gjalda ivirtíðarsats. Arbeiðarin sum í 8 tímar rindar skatt av síni inntøku, fær alla tímalønina harútyvir óskerda!

Kappingarføri hjá føroysku vinnuni vil við hesi skipan gera eitt risalop rætta vegin.

**Hevur hetta tín áhuga**

Um so er, at hetta hevur tín áhuga, so gev mær stuðul tín til at arbeiða víðari við málinum og fremja tað í verki.

Eg eri eitt av valevnum sjálvstýrisfloksins til løgtingsvalið 19.januar.

**Tín atkvøða – mín styrki.**